# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 12.06.2017 kl. 17.30

Á fundi: Trúgvi Gudmundarson
Niels Jacob Thomsen
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen

Ikki møtt: Janus Thomsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá rørslufelagnum Hvistuni.**
   Samtykt varð einmælt **ikki** at stuðla.

2. **Útleigan av jørð til at heysta 2017.**
   Samtykt varð at leiga stykkið í Sondunum og Støðlarnar út til hægstbjóðandi.

3. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 10i, Hvalba.
- Skriv viðv. gøtuljósum í Sandvík.
- Byggiloyvi bilhús á matr. nr. 123b, Hvalba.
- Byggiloyvi bilhús á matr. nr. 431c, Sandvík.

**Trivnaðarnevnd:**

- Skriv viðv. bygdagøtuni Geilini í Sandvík.

**Vega- og havnanevnd:**

- Innkomin tilboð uppá gelendara til Fiskieiðið.

**Fíggjarnevnd:**

- Innkomin tilboð uppá gelendara til Fiskieiðið.

**4. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Niels Olaf Eyvindsson):**

- Byggiloyvi hoyggjhús matr. nr. 10i: Skriv er sent teimum saman við leiðreglum í sambandi við byggiloyvi.
- Skriv viðv. gøtuljósum Sandvík: Samtykt varð einmælt, eftir tilmæli frá nevndini at siga frá, at kommunan er í ferð við at umvæla gøtuljósini í sóknini.
- Byggiloyvi á matr. 123b: Tekniska nevnd mælir til at fylgja tilmælinum um smávegis broytingar í umsóknini. Samtykt varð einmælt, at tá nevndu broytingar eru gjørdar, kann byggiloyvið verða útskrivað.
- Byggiloyvi á matr. nr. 431c: Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum um smávegis broytingar í umsóknini. Tá broytingarnar eru gjørdar, verður byggiloyvið útskrivað.

**Trivnaðarnevnd (framløga Eir J. Norðberg):**

- Skriv viðv. Ung í arbeiði: Nevndin hevur viðgjørt málið viðv. Ung í arbeiði í summar. Mælt verður til, at benkur og borð í sóknini verða málað, vegurin vestur á Eggjarnar hampaður um, somuleiðis vegurin frá Heiðatrøðini oman til Kúgvhylin. Flyta grót og sand/mold burtur niðanfyri brúnna, har Hamarsá rennur út og møguliga gera lidnan vegin/gøtuna við Geilina í Sandvík. Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum.

**Vega- og havnanevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Tilboð uppá gelendara til Fiskieiðið: Nevndin mælir til at taka av tilboðnum á kr. 34.100 v/MVG, ið umfatar galvaniserað rør við Kee klamps. Við í tilboðnum er niðurtøka, burturbeining og forarbeiði at bora nýggj hol í lendið.

**Fíggjarnevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Tilboð uppá gelendara til Fiskieiðið: Nevndin mælir til at taka av tí lægsta tilboðnum á kr. 34.100 v/MVG. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum frá Vega- og havnanevdini og Fíggjarnevndini og taka av hesum.

**5. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.30

Trúgvi Gudmundarson Magni Bertholdsen Niels J. Thomsen Rúni Thomsen

Niels Olaf Eyvindsson Gunnhild Mortensen Eir J. Norðberg